# Føroyska ABC'ið hjá Sjúrði Skaale
## - Ein fortreyt fyri at tað føroyska móðurmálið fær nøktandi skrivtbúna

REGIN EIKHÓLM



Nú Sjúrður Skaale, løgtingslimur, hevur verið so hugdjarvur at leggja fram uppskot á Løgtingi um eitt hóskandi føroyskt alfabet, er tað áhugavert at so mong taka positivt undir við uppskotinum. Ikki tí okkurt illsinnisgleps er eisini at síggja í bløðunum, men hesi eru uttan reella grundgeving, men meiri á tann bógvin - soleiðis plaga vit ikki at gera.

**Uppskotið hjá Hammershaimb et al. frá 1846**
Faktum er, at tað føroyska móðurmálið til dags dato ikki hevur havt ein nøktandi skrivtbúna, men hevur hjálpts við Uppskotið hjá Hammershaimb et al. frá 1846. Hetta Uppskotið, sum í høvðusheitum byggir á íslendskan málleist og ikki føroyskan, er tentativt (royndarætlað) og ikki normativ (fyriskrivandi) fyri føroyska móðurmálið. Men hóast tað, so hava nøkur í Føroyum forelskað seg í Uppskotinum og identificerað tað við føroyska málið og hava roynt at einsrættað føroyska málið, so tað passar inn í Uppskotið - hug en hæl og klip en tå princippið. Hetta hevur í ávísan mun eydnast teimum, men av tí at henda hugsan byggir á eina málsliga missfatan og helst eisini á móðurmálsligt ómegn, er missnøgdin við førda málpolitikkin nú so stór, at føroya fólk krevur broyting, so okkara múlabunda móðurmál aftur kemur til heiðurs og æru – bæði í skrivt og talu! Uppskotið hjá Hammershaimb var eitt neyðugt (royndarætlað) stig á leiðini, men tað er lítið meir enn systkinabarn við føroyska móðurmálið.

Broytingin og Jóannes Patursson í 1896 kom uppskot um broyting í stavseting, ið skuldi lætta um tað føroyska skrivtmálið og eisini leggja tað nærri upp at tí føroyska móðurmálinum. Uppskotið kom kom frá eini sjeymannanevnd vit góðum fólki: V.U. Hammershaimb, Dr. Jakob Jakobsen, J. Hammershaimb, J.C. Olsen, Chr. Bærentsen, C. L. Johannessen og Fr. Petersen, men uppskotið vann ikki frama, tí Jóannes Patursson tvíhelt um tann íslendska málleistin heldur enn tann føroyska.

**Øll menning í Føroyum er komin frá Europa**
Tey seinastu mongu hundrað árini er stórt sæð øll menning í Føroyum komin frá Europa serliga via Týskland, Danmark og Noregi. Bæði kristindómur og reformatiónin, yrkisfakligir sum intellektuellir førleikar, læristovnar, skúlar og universitetir og ikki at gloyma musikkin og listina. Alt hetta floymdi fornýggjandi og svalandi inn yvir okkara fjarskotnu og fámentu oyggjar, saman við hóskandi terminologium ella orðfari avleitt av alskyns tungumálum og ikki minst frá tí ikki tosaða málinum, latíni. Við tíðini gjørdust hesi fyribrigdir ein integreraður partur av okkara móðurmáli, og tí er sjálvsagt neyðugt at hava eitt hóskandi føroyskt alfabet, um vit skulu kunna festa móðurmálið á blað. Hetta alfabetið finna vit ikki við at venda okkum frá Europa men til Europa.

Men hvat hendir. Hesi seinastu 50 árini hava nakrir málsøknir puristar her á landi roynt at niðurbróta og tilonkisgera henda okkum so náttúrliga givna móðurmálsliga førleika og hava innført íslendsk hugtøk og onnur lættisoppa finn–upp–á hugtøk, samstundis sum okkara heimligu altjóða terminilogiir verða bannlýstar. Hetta hevur verið til óbøtaligan skaða fyri okkara mál, tí stringensurin í málinum hvørvur, og móðurmálið, sum skuldi verið grundstøðið undir allari menning og intellektuellari tilvitan, endar sum eitt nýføroyskt esperanto uttan sál, mið og mál! Kendi eysturríkski filosoffurin Ludvig Wittgenstein (1889-1951) sigur tað sera greitt: »Eingin kann hugsa longri enn hann hevur mál til«.

**Frælsi til móðurmálið og føroyskt alfabet**
Tað er vælskiljandi, at onkur av puristisku málpávunum eftir 50 ár við einaveldi og móðurmálsligari misskiljing nú fær kaldar føtur, tí Sjúrður Skaale, løgtingslimur, nú tekur fyrsta stigið til frígering av fjøtraða føroyska móðurmálinum, við at geva tí eitt alfabet so hóskandi skrivtbúni kann geva móðurmálinum frælsi og veingir til tað andans flog í altjóða høpi, vit føroyingar so leingi hava bíðað eftir.

Góðan byr Sjúrður!

# Ynskja altjóða konserthús í Havn



Tónleikarar í Tórshavn stovnaðu í febuar í ár ein arbeiðsbólk, sum hevði til uppgávu at arbeiða fyri at fáa eitt konserthús í Tórhsavn.

Arbeiðsbólkurin arbeiðir somuleiðis fyri at betra umstøðurnar fyri tónleikarar og áhoyrarar í Tórshavn og øllum Føroyum. Tað, sum hevur fyrsta prioritet er eitt konserthús í Tórshavn, sum lýkur altjóða krøv.

Arbeiðsbólkurin hevur javnan fund og arbeiðir í løtuni við stuðulstiltøkum sum vera í heyst.

Í verandi løtu ber til at vitja bólkin »Konserthús í Havn« á facebook.com, har tú kann gera tína meining galdandi viðvíkjandi konserthúsi í Tórshavn.

Á síðuni eru trý uppskot løgd fram um, hvussu konserthúsið skal verða. Í hesum sambandi kanst tú siga tína hugsan við at skriva eina viðmerking ella atkvøða fyri tí uppskotinum, ið tær dámar best.

Vit eru somuleiðis í ferð við at víðka um bólkin, so vit hava eina enn breiðari umboðan.

Arbeiðsbólkurin telur sjey fólk og umboðar í løtuni:
· FUTT
· Jazztónleikarafelagið
· Fólkatónleikarafelagið
· Einleikarafelagið
· Felagið Føroysk
· Tónaskøld
· Mentón
· Kórsambandið
· Umboð fyri áhoyrarar
· Havnar Jazzfelag
· Konsertfelagið
· TUTL
· FUR

**Arbeiðsbólkurin fyri konserthús í Havn**

# Viðmerking til greinina:
## Ein risastór rokning til allar føroyingar

KÁRI P. HØJGAARD
løgtingsmaður



Tað var ikki einans blokkurin sum frysti í 2002. Fyri Helga Abrahamsen eru bæði tíðarrokning, visjónir og framtíðar møguleikar av hesi orsøk fullkomuliga blokk-eraðar.

Tey gomlu høvdu sum høvuðsreglu at: ”Vit skuldu seta tering eftir nering”. ABC samgongan, sum Helgi er ein partur av, hevur havt buktina og báðar endarnar seinastu tvey valskeiðini, undantikið nakrar mánaðar við CHE. Upphæddin á blokkinum er støðug ca. 635 mió, og sambært núverandi samgonguskjali er ikki ætlanin at hækka hesa upphædd:

**Ásannandi, at tað er umráðandi fyri samfelag okkara at vaksa seg til ein sjálvberandi búskap, er semja millum flokkarnar um, at ríkisveitingin verður lækkað við 15 prosentum av reella inntøkuvøkstrinum av skattum og avgjøldum hjá landskassanum við støði í meðal vøkstrinum seinastu 5 árini. Skipanin kemur í gildi í sambandi við fíggjarlógina fyri 2010.**

Kári á Rógvi løgtingsmaður hevur roynt at fingið greiði á loyndarmálinum, hvussu omanfyri nevndi tekstur skuldi skiljast, og setti Jóannesi Eidesgaard landstýrismanni í fíggjarmálum tveir § 52A spurningar, nr. 18 og nr.23. Svarið tingmaðurin fekk, gjørdi ikki støðuna greiðari.

**Av tí at fíggjarliga støðan er sum hon er, verður spurningurin um heildarveitingina eftirmettur. Eisini tí, at ávís ógreiða er um orðingina í samgonguskjalinum.**

Helgi, kann tú greiða frá, hvussu nógv ríkisveitingin lækkar eftir hesum frymlinum og hví Sambandsflokkurin hevur undirritað eitt samgonguskjal um blokkniðurskurð, samstundis sum tú tekur frástøðu til avgerðir, ein meiriluti av Løgtinginum hevur samtykt fyri 7 árum síðani?

Míni orð á tingsins røðarapalli vóru ein áheitan á samgonguna, at fíggjarligu byrðarnar vóru lagdar á breiðastu herðarnar(300-400 tús. og meira), tí í desember raktu øll trý spariuppskotini pensjónistarnar.

Skattalætti til hægru inntøkurnar, rentufrítt lán til ávísar kommunur, at landið sjálvt ber allan kostnaðin í ávísa íløgu á mentanarøkinum móti siðvenju, íløgur fyri milliardaupphædd í undirstøðukervið sum fíggjarliga niðurbindur samfelagið nógv ár framyvir, er ikki tekin um skilagóða stýring,

Avbjóðingin er stór, um vit fíggjarliga ikki skulu verða tikin av fótum. Ein tómur ólavsøkupakki rættar ikki samfelagsskútuna, her skulu aðrir bollar í suppuna.

# Kampingvognar koppaðu av vindi

**Seinnapartin og tíðliga á kvøldi í gjár vaks vindurin brádliga nógv, og er hetta helst komið óvart á mong. Løgreglan fekk í gjár onkra fráboðan um skaða av vindi**



*Hesir campingvognarnir fingu eina heldur harðliga viðferð í nógv vindinum í gjár*

*Mynd: Jens Kr. Van*

112
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Í gjár gjørdist talan um nakrar rættiliga harðar hvirlur seint á seinnapartinum og tíðliga á kvøldinum. Hetta kom helst eisini óvart á fólk, og onkur smávegis skaði stóðst av hesum.

Ein bátur sleit í Hvalvík, men menn fingu tó skjótt surrað hann væl aftur. Ein fráboðan kom eisini um leysar takplátur, ið lógu og fuku við rundkoyringina í Søldarfirði. Hetta var helst í samband við at eini hús í Søldarfirði eru undir umvæling.

Um klokkan 18 fekk løgreglan eisini eina fráboðan um, at tveir kampingvognar vóru koppaðir við Leynavatn. Eigararnir komu tó skjótt á staðið, og fingu surrað kampingvognarnar fastar, so eingin størri skaði stóðst av hesum.